# Umhvørvið óhóskandi

**Rokkuti bólkurin, Eager to Please, fór á tjóðpallin, tá FUTT í býin var í Tórsgøtu fríggjakvøldið. Eager to Please fingu fullstendiga skeivt umhvørvi at framføra í, og so var konsertin seinkað í ein hálvan tíma.**

TÓNLEIKUR
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Tá fólk høvdu bíðað í ein góðan hálvan tíma, fóru Eager to Please endiliga á pall á tjóðpallinum til FUTT í býin fríggjakvøldið.

Tað gekk ein løta, áðrenn ótolnið hjá áskoðaranum varð skift út við svingandi beinum og klappum í takt við tónleikin.

Tónleikurin var fínur, men hóskaði als ikki til lítla hølið, har teir framførdu. Fólk sótu niðri, og tískil ber ikki til at nýta tónleikin, sum hann átti at vera nýttur. Eitt dansigólv hevði uttan iva verið tað, ið skuldi til fyri at fullgera upplivilsið við Eager to Please.

Eager to Please fingu eitt skeivt umhvørvi at framføra í, og tí eydnaðist framførslan ikki. Eg hevði tó verið fyrst á dansigólvinum, um fóru á pall á einum dansistaði.

Eager to Please fingu eitt skeivt umhvørvi at framføra í, og tí eydnaðist framførslan ikki. Eg hevði tó verið fyrst á dansigólvinum, um teir vóru í einum líknandi dansistaði sum REX.



# Føroyskar Spice Girls

**Hóast framførslan í ólavsøkutjaldinum ólavsøkuaftan miseydnaðist orsakað av vánaliga ljóðinum, eru nýggju sangirnir stak góðir, og hvør veit – kanska hava vit fingu tær føroysku Spice Girls**

TÓNLEIKUR
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Faroe 5 hevði sína næstu konsert í ólavsøkutjaldinum ólavsøkuaftan. Bólkurin hevði bara tvey løg frammanundan, men nú eru eini nýggju nýggj løg gjørd, ið koma á fløgu til septembur. Næstan øll nýggju løgini eru á enskum, og hesi riggaðu stak væl. Løgini fanga áskoðararnar við feitum rútmum, samstundis sum Faroe 5 genturnar høvdu eina lívliga og góða koreografiska framførslu.

Føroysku Faroe 5 genturnar kundu mint eitt sindur um fimm ensku genturnar, ið á sinnu mannaðu gentubólkin Spice Girls. Eingin Spice genta dugdi rættiliga at syngja, tá tær fóru í hált við hendan bólkin. Somuleiðis eru røddirnar hjá gentunum í Faroe 5 rættiliga misjavnar. Summar sterkar og reinar røddir eru millum genturnar, meðan aðrar eru meira smædnar og tískil sera veikar.

Sjálvt løgini sótu eftir í høvdinum, tá fólk fóru úr tjaldinum eftir konsertina. Helst ensku løgini, dámdi mær sera væl. Í roynd og veru er bara eitt lag, mær ikki dámar. >>Bara eitt spæl<< er barnsligt og hóskar tískil als ikki til tey nýggju løgini, ið smábørn allarhelst ikki høvdu lurtað eftir. Støðið á nýggju sangunum eru nógv hægri, enn har omanfyri nevndi sangurin hoyrir heima. Sera óheppið, tí, sum eg skilji á lagnum, eráhoyrarabólkurin ikki yngri børn.

Framførslan í ólavsøkutjaldinum var fín, men ljóðið var út av lagi vánaligt. Tað skurraði í hátalarunum, og støðið fór somuleiðis syngjandi í botn av tí sama. Ein sera misjøvn konsert, men við nýggju, góðu løgunum, sær út til, at ein ljós framtíð kann vera fyri framman hjá teimum fimm gentunum handan Faroe 5.



# Thrash í býin

**Ungu havnarmenninir í Synarchy pikkaðu dúgliga korn og góvu alt teir áttu, og í nátt eydnaðist tað sum heild væl hjá teimum**

TÓNELIKUR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Synarchy spælir thrashmetal og eitt lyklaorðunum innan hetta slagið av tónleiki er skjótleiki og ´tightness´ (at spæla ´tight´, at fáa tingini at sita væl ). Tað gongur við rúkandi ferð, og tí krevur tað konsentratión og neyvleika frá hvørjum einasta limi. Men inn í millum var spælið ikki nóg neyvt hjá Synarchy, og tað heila kendist eitt sindur kaotiskt akkurát tá. Men sum heild spældu teir væl, og tá koyrdi tað eisini, sum tað skuldi.

Eg havi serliga hug til at nevna forsangaran Leon Hansson, sum eg haldi hava stórt potentiali. Hann hevur eina útstráling, ið ein forsangari má hava. Hann hevur lætt við at skifta millum at growla/brøla og yvir í sang, og gjørdi hann eisini nógv av hesum. Bæði at growla og syngja ger hann, eftir mínari meting, rættiliga væl, hóast tað framvegis ikki heilt er á sama støði sum hjá Mikkjali úr SIC. Men Leon mennir seg í hvørjum og spennandi er at vita, hvar hann er um nøkur ár.

Hóast bólkurin hevur ymiskt at arbeiða við (hvør hevur ikki tað?), so síggi eg nógv spennandi í Synarchy og teirra tónleiki. Framtíðin sær spennandi út hjá teimum.

At eg var millum best egnaðu fólkunum á redaktiónini til at ummæla Synarchy, sigur eitt sindur um støðuna innan ummælaraøkið. Metal ummælarar eru ein trotvøra innan føroyskan tónleik, og tað er ikki bara her í Miðlahúsinum, at tað er so. Persónliga havi eg aldrin lisið eitt ummæli, ið er skrivað av einum føroyskum metalhøvdi nakrantíð! Vónandi kemur onkur skjótt, ið kann geva metalbólkum virðilig ummæli.



# Kultfaktorurin í topp

**SIC vóru teir triðju á størra pallin á ólavsøkukonsertini. Feit orka, sum var alt ov hart frá, er metta úrslitið higani frá.**

DANSUR
*Sunneva Háberg Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*

Eg dyrki yvirskotið hjá Mikkjal at 1: vera ein framfúr feitur frontfigurur. 2: hava eina fantastiska orkumikla rødd. 3: vera ein undirhaldari av ovastu rók. 4: samstundis sum hann klárar at vera frekur og seksutur og halda bólkin glaðan og við uppá tað alla vegin ígjøgnum. Respekt.

Tað var tó eitt, sum irriteraði í hvussu er meg, og sikkurt fleiri onnur: Eg skilti ikki heilt, at ljóðið skuldi vera SO hart frá, tá økið er so lítið. Tað vísti seg faktiskt at vera betri at fara afturum ljóðpultin at lurta. Frammanfyri pultin dukaði bara ógvusliga í oyrunum og skróv og óljóð boraðu seg inn í heilan. Og eg plagi ikki at vera tann, sum klagar um, at tað er ov hart... Tó skal sigast, at hetta nokk er tað frægasta ljóðið, eg nakrantíð havi hoyrt til eina metalkonsert á ólavsøkukonsertini, síðani eg byrjaði at ganga í kommunuskúlagarðinum sum 15 ára gomul.

Óansæð ljóð og alt tað, so vóru SIC totalt kul. Við feitum kendum løgum sum Done Pretending og Rosegarden in Hell og nýggjari løgunum Fighters They Bleed og Slither fingu teir flest allar knokkar blástar væl og virðiliga umkoll. So virðiliga, sum man kann ynskja sær tað á einari ólavsøkukonsert.

